# Landsstýrið spyr vinnuna til ráðs um samráðingar




*Nótaflotin vil sjálvsagt varðveita sum mest av uppisjóvarfiskinum, sum Føroyar eiga og fáa í avtalu við onnur lond, meðan flakatrolararnir vilja sleppa at brúka so nógv sum gjørligt av hesum tilfeingi í býti við tosk úr Barentshavinum*

**SAMRÁÐINGAR Nú fiskiveiðisamráðingarnar við Rusland stunda til, hava umboð fyri uppisjóvarskipini og flakatrolararnar verið á fundi við landsstýrismannin í fiskivinnumálum í morgun. Spurningurin er, hvussu stýrast skal millum sker, nú eingin svartkjaftur er at keypa tosk í Barentshavinum fyri**

Vilmund Jacobsen

Í morgun hevur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Jacob Vestergaard, verið á fundi við umboð fyri uppisjóvarflotan og flakatrolararnar, sum fiska í Barentshavinum. Tað er landsstýrið, sum hevur kallað partarnar til fundar, nú fiskiveiðisamráðingarnar við russar stunda til.

Føroyar og Rusland hittast nevniliga til fundar um mánaðarskiftið november/desember í Moskva.

Hin stóri spurningurin er, hvat Føroyar kunnu bjóða russum í staðin fyri svartkjaft, nú svartkjaftastovnurin er so illa fyri, og føroyski parturin av kvotuni í komandi ár er minkaður úr 130.000 tonsum niður í sløk 10.000 tons.

## Ymisk áhugamál

Nótaflotin vil sjálvsagt varðveita sum mest av uppisjóvarfiskinum, sum Føroyar eiga og fáa í avtalu við onnur lond, meðan flakatrolararnir vilja sleppa at brúka so nógv sum gjørligt av hesum tilfeingi í býti við tosk úr Barentshavinum.

Tvey av fýra feløgum, sum hava uppisjóvarskip, hava eisini skip í Barentshavinum sum fiska tosk, og hetta hevur ivaleyst sín týdning fyri áhugamálini.

JFK í Klaksvík hjá Hanusi Hansen og øðrum og Framherji á Toftum hjá Anfinni Olsen og øðrum hava bæði uppisjóvarskip og skip, sum fiska í Barentshavinum. Hinvegin hava Varðin í Gøtu og Norðborg í Klaksvík bara uppisjóvarskip – og ikki flakatrolarar í Barentshavinum.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at á fundinum í morgun vil landsstýrið hoyra frá vinnuni, hvussu hon ynskir sær, at føroyska útspælið til samráðingarnar við russar verður.

## Trupul støða

Tað er væntandi, at hetta verða truplar samráðingar, nú svartkjafturin, sum eftir er, munar so lítið sum býtisfiskur í eini nýggjari avtalu. Spurningurin er so, hvørji ráð eru til at taka.

Landsstýrismaðurin sigur, at í galdandi avtalu millum Føroyar og Rusland fáa russar umleið 85.000 tons av svartjafti og umleið 14.000 tons av makreli.



## » í løtuni vita vit ikki, hvussu »svangir« russar eru, og tað kann bert tíðin fara at vísa

JACOB VESTERGAARD

– Men nú okkara samlaði partur av svartkjafti fyri 2011 bert er sløk 10.000 tons, er greitt, at hetta munar lítið í nøkrum býti við russar.

Jacob Vestergaard ásann-